FYLGISKJAL 1

Hanna D. Andreassen

Fra: Rói Hansen <roih@tsk.fo>
Sendt: Wednesday, January 13, 2021 15:59
Til: Rúni Heinesen
Emne: Lógaruppskot

Um studna endurgjald Næmingaráðið helt tað vera gott fyri góðskuna á útbúgvingini, av tí at tað kann økja um næmingavirksemi. Tó skuldi viðmerkjast, at tad var tydningarmikið at næmingur skuldi í tí føri nágreiniliga fáa at vita, hvat krevst fyri at vera „lestrarvirkin" soleiðis at misskiljingar ikki standast av tí. Um hægri studning til útisetar Breið semja var um at hetta ítrivið fór at gera tað alsamt meira hugaligt at lesa uttanlanda, og vinna sær ynskiliga útbúgving. UWC Í næmingaráðnum var semja um at miðnámsnæmingar á UWC skuldi javnsetast vid aðrar miðnámsskúlanæmingar. Hetta verður tó sagt vid tí fyrivarni, at vit ikki kenna nógv til UWC sum heild. Samanumtikið hildu vit tad vera eitt gott lógaruppskot.

Vinaliga Rói R. Hansen, skrivari í næmingaráðnum í TSK
roih@tsk.fo